# Hernaðarkanningin skal halda fram



*Løgtingið fer væntandi at lata løgmansskrivstovuni 400.000 krónur, so hernaðarkanningin kann halda fram*

EYÐUN KLAKSTEIN

Arbeiðið at kanna hernaðarligu støðu Føroya undir kalda krígnum skal halda fram, og tí skal løgmansskrivstovan hava eina eykajáttan.

Fíggjarnevndin tekur undir við uppskotinum um, at løgmansskrivstovan skal hava eina eykajáttan upp á 400.000 krónur, og í gjár skuldi tingið hava 2. viðgerð av eykajáttanarlógini, sum hendan eykajáttan er partur av. Tað var væntandi, at løgtingið fór at samtykkja hesa eykajáttanarlóg.

Nógvar kanningar eru longu gjørdar av hernaðarligu viðurskiftunum hjá Føroyum, men hesar kanningar eru fyrst og fremst gjørdar í Vesturheiminum – í USA, Danmark og Føroyum – og tað er ikki nøktandi, heldur løgmaður.

Hann vil eisini hava eina kanning av skjalagoymslum eystanfyri, og tað er hetta arbeiðið, sum nú skal setast í gongd.

### Mátti útseta kanningina

Í upprunaliga uppskotinum til fíggjarlóg fyri ár 2000 var hernaðarkanningin tikin við, men játtanin til løgmansskrivstovuna varð skorin við eini hálvari millión, og tí var neyðugt at bíða við onkrum ætlanum.

– Tey einastu arbeiðini, sum ikki vóru sett í gongd, vóru framhaldið av hernaðarkanningini og útoyggjanevndin. Tí mátti veljast millum hesi bæði, og vit hildu tað vera rættast, at lata arbeiðið hjá útoyggjanevndini fara í gongd, sigur Anfinn Kallsberg, løgmaður.

Henrik Old, løgtingsmaður, setti 7. apríl løgmanni fyrispurning um málið, og í svarinum til hendan fyrispurning segði Anfinn Kallsberg, at æltanin alla tíðina hevði verið at gjørt kanningar eystanfyri, men at arbeiðið mátti útsetast, tí pengar vóru ikki tøkir.

### Aðalorðaskifti útsett

Løgmaður svaraði eisini Henriki Old, at hann ætlaði sær at søkja løgtingið um eykajáttan til hesa kanning, tá aðalorðaskifti hevði verið um Svørtubók, sum var úrslitið av fyrstu kanningunum.

Men tað hava verið so nógv aðalorðaskifti í løgtinginum í vár, at løgmaður og løgtingsformaðurin avgjørdu at bíða við orðaskiftinum um Svørtubók til næstu tingsetu. Hetta orðaskifti verður tí ikki fyrr enn um fýra mánaðir.

Hesum skal eykajáttanin ikki at bíða eftir, og løgmaður hevur tí longu søkt løgtingið um eykajáttan, so farast kann undir at finna skjøl í eystureuropeiskum skjalagoymslum.

Nógvar av hesum skjalagoymslum hava mest sum staðið víðopnar seinastu árini, men eingin hevur enn gjørt miðvísar kanningar av, hvørji skjøl eru at finna um føroysk viðurskifti í hesum goymslum.

Men løgmaður heldur, at tað hevði verið áhugavert at fingið staðfest, hvør eystureuropeiska ávirkanin í Føroyum var undir kalda krígnum.

### Broyta arbeiðsgongdina

Tá kanningar vóru gjørdar vestanfyri, syrgdi ein stýrisbólkur fyri hesum arbeiði. Í bólkinum sótu Rúni Joensen, sum var formaður, Jákup Thorsteinsson, Jóannes Dalsgaard og Jóan Pauli Joensen. Hesin bólkur fekk so hjálp frá serfrøðingum til at gera kanningar.

Løgmaður sigur við Sosialin, at nú kanningarnar verða settar í gongd aftur, verður arbeiðið skipað øðrvísi, men hann kann ikki siga, hvussu tað verður, tí endaliga avgerð er ikki tikin um tað enn.

– Men vit vóna, at arbeiðið kann setast í verk longu hesa vikuna, sigur Anfinn Kallsberg.

Hann sigur eisini, at játtanin upp á 400.000 krónur í ár bara er nóg mikið til at seta arbeiðið í gongd. Tað skulu fleiri pengar til, fyri at kanningararbeiðið skal gerast liðugt.

Seinast tók tað meira enn trý ár, frá tí at løgtingið samtykti, at kanningar skuldu gerast, til almenna frágreiðingin var klár.

# Neyðugt við eyka eykasýning

*Tað var beinanvegin útselt til eykasýningina av Seks í pyjamas á Oyrabakka í kvøld, og tí verður ein eykasýning afturat í kvøld*

EYÐUN KLAKSTEIN

Tað var beinanvein útselt til eykasýningina av skemtileikinum, Seks í pyjamas, sum verður á Oyrarbakka í kvøld.

Klaksvíkar Sjónleikarfelag spælir í løtuni hendan leikin, og í vikuskiftinum høvdu tey fýra sýningar fyri fullum húsum á Oyrarbakka. Samanlagt vóru næsta 1000 fólk til leikin um vikuskiftið.

Framvegis vóru tað fólk, ið ikki fingu atgongumerki, og tí varð avgjørt av hava eina eykasýning í kvøld klokkan 19.00.

Tey 250 atgongumerkini til hesa eykasýningina vóru seld alt fyri eitt, og tí varð avgjørt at hava eina eyka eykasýning í kvøld kokkan 22.00.

Tá vit tosaðu við Klaksvíkar Sjónleikarfelag á døgurða í gjár, vóru longu 100 atgongumerki seld til seinnu sýningina í kvøld.

### – Hetta er ótrúligt

Higartil hava umleið 3.200 fólk sæð leikin, og talan er um best umtókta leikin hjá Klaksvíkar Sjónleikarfelag nakrantíð.

Einasti leikurin hjá sjónleikarfelagnum í Klaksvík, sum kann sammetast við Seks í pyjamas, er Landastrokið, sum varð spældur í 1982, tá fólk framvegis ikki høvdu fingið sjónvarp.

Men nú slær Seks í pyjamas øll met.

– Hetta er heilt ótrúligt, sigur Adelborg Linklett, sum er ein av leikarunum í leikinum, og sum hevur spælt sjónleik í nógv.

– Eg havi ongantíð áður upplivað slíkan áhuga fyri einum leiki, og nú ganga vit sum í einum rúsi av hesum, sigur hon.

Leikurin hevur fingið fram úr góð skoðsmál alla staðni, har hann hevur verið sýndur, og sýningarnar kring landið hava víst, at tað er ov mikið at flenna undir leikinum.

Um vikuskiftið fer Klaksvíkar Sjónleikarfelag til Suðuroyar at spæla Seks í pyjamas. Spælt verður í Royn-høllini í Hvalba fríggjakvøldið og leygardagin.

# Ikki falskur alarmur

*Tá vit í gjár skrivaðu, at tað var falskur alarmur í Tinganesi um vikuskiftið, so er tað bara lutvíst rætt. Talan var um, at trýstið í sprinklaraanlegginum fall, og so boðar skipanin Brandstøðini frá av sær sjálvum. Og tá eldur ikki er í, so verður tað skrásett sum falskur alarmur*

SVEINUR TRÓNDARSON

Sløkkiliðið og løgreglan løgdu til brots um vikuskiftið, tí ein automatisk fráboðan var komin til sløkkiliðið um, at trýstið í sprinklaraanlegginum fall. Tá so er, boðar skipanin sjálv brandstøðini frá, og tí fór sløkkilið mansterkt av húsi. Men alt til onga nyttu, tí eldur var tíbetur eingin. Orsøkin var tann, at vatnmenninir hjá býráðnum arbeiddu upp á vatnleiðingina í økinum kring Tinganes, og tí fall trýstið í sprinklaraanlegginum.

Bjarni Thomsen, stjóri á Vaktargarðinum, sigur við Sosialin, at tað er sera óheppið fyri hansara virkið, at ein slík fráboðan verður skrásett, sum falskur alarmur, tí teir hava eisini uppgávur úti í Tinganesi.

- Vit hava tjóvaríalarm og roykávaringarskipan í Tinganesi, og tá tað verður skrásett sum falskur alarmur, so kann tað síggja út, sum virkaði okkara skipan ikki eftir vild. Tað er ikki tað, sum var orsøkin, sigur Bjarni Thomsen.

Hann vísir á, at roykávaringarskipanin boðar frá nógv fyrr enn sprinklaraskipanin, og tí kann ein slík útsøgn koma illa við hjá honum, sum selir roykávaringarskipanir.

- Munurin millum roykávaring og sprinklara er, at roykávaringin fer í gongd einar tíggju minuttir áðrenn sprinklarin. Tað gevur sløkkiliðnum møguleika at koma á staðið í so góðari tíð, at eldurin ikki rættuliga hevur fingið fatur á. Hinvegin fer ein sprinklari í gongd, so oysir hann vatn á eldin alla tíðina, og vatnið kann eisini gera stóran skaða, sigur Bjarni Thomsen.

Heiðrikur Christiansen frá sløkkiliðnum í Havn, er ikki ósamdur við Bjarna. Hann váttar, at tað var trýstið sum fall, og at tað var orsøkin til at teir fóru mansterkir av húsi. Hinvegin heldur hann ikki, at roykávaringin útilokar eina sprinklaraskipan ella øvugt, tí báðar skipaninar kunnu koyra saman um tað skal verða.

Meðan roykávaringin boðar frá tá tað rýkur, so boðar sprinklaraskipanin frá, tá hitin fer upp um eitt ávíst stigatal. Ein glaskolba situr, sum ein proppur, í endanum á sprinklaranum og tá hitin t. d. fer upp um 65 stig, brestur kolban og vetnið sleppur at renna. Tá fellur trýstið og sløkkiliðið verður fráboðað av sær sjálvum.

Til stuttleika kunnu vit enda við, at tað fyri ikki so langari tíð síðani brann í Tinganesi. Ta ferðina boðaði roykávaringarskipanin frá og stutt eftir høvdu bæði løgregla og sløkkilið fingið fráboðan.





*Aliflakin hjá Gulanum er líka stórur sum stóru rækjutrolararnir* *(Mynd: Jens Kristian Vang)*

# Byggisett í Nólsoyarfirði

*Partafelagið Gulin í Havn fekk herfyri ein stóran aliflaka úr Noreg. Flakin skal loysa gomlu plastikringarnar av í Nólsoyarfirði*

EDVARD JOENSEN

Nýggju alibúrini, sum verða at síggja á føroyskum firðum og sundum í framtíðini, verða byggisett, har til ber at skoyta uppí, so hvørt sum tørvur er.

Gomlu aliringarnir, sum vit kenna, hvørva smátt um smátt, og nýggjar støðir koma í staðin.

Við Vestaru Bryggju í Havn hevur ein flaki ligið seinastu tíðina. Tað er ein alistøð, sum Gulin í Havn hevur keypt úr Noreg og sum ætlaður er til aling í Nólsoyarfirði.

Bogi Jacobsen, stjóri á Gulanum, sigur, at hesin flakin, teir hava fingið úr Noreg, er sveisaður í Póllandi. Hann er av sama slagi sum teir, ið nýttir verða í eitt nú Noreg, Kanada og Skotlandi. Men hann er gjørdur væl sterkari fyri at klára umstøðurnar í Nólsoyarfirði.

Hesin flakin hjá Gulanum er ein eind við fýra búrum og fóðurgoymslu, sigur Bogi Jacobsen. Hann er gjørdur soleiðis, at til ber at byggja aftrat, tvey og tvey búr, um tørvur er á tí. Soleiðis verður gjørt í Vestmanna, greiðir Bogi Jacobsen frá. Har hava teir eisini fingið ein nýggjan flaka, sum verður settur upp í tann, sum frammman undan liggur har.

Eisini í Hvannasundi er ein slík støð, veit Bogi Jacobsen at siga frá.

Flakin, sum Gulin nú hevur fingið, fer at rúma umleið 150 til 200 tonsum av laksi í hvørjum búri. Fóðurgoymslan tekur 100 tons. Tað er tað, sum brúkt verður um vikuna, sigur Bogi Jacobsen.

Flakin er eisini útgjørdur soleiðis, at flutningsskipið, sum kemur við fóðrinum, leggur beinleiðis at bryggjuni, sum gjørd er á flakanum.

Hesin nýggi flakin fer at loysa nakrar av gomlu plastikringunum av. Tað fer at verða rættiliga nógv arbeiðsligari, sigur Bogi Jacobsen.

Ein trupulleiki, teir høvdu í Nólsoyarfirði, var, at tað var eitt sindur torført at fáa nótirnar í teimum smáu ringunum at standa ordiliga í stryeminum. Hetta vænta teir fer at vera munandi betur nú, sigur hann.

Samlaða ársframleiðslan hjá Gulanum er umleið 2.000 tons av laksi.

Eisini hava teir smoltstøð í Svínoy, har teir ala eina millión smolt árliga, umframt at teir eisini hava áhugamál aðrastaðni. Eitt nú í kryvjivirkinum á Strondum, sigur Bogi Jacobsen.


## Skrivari til

# Atlantic Petroleum

*Søkt verður eftir skrivara til P/F Atlantic Petroleum. Virksemið felagsins er nú vorðið so umfatandi og fjøltáttað, at neyðugt er at seta fólk til at taka sær av dagliga arbeiðinum á skrivstovu felagsins.*

Skrivarin skal hava um hendi dagliga raksturin av skrivstovu felagsins, so sum:
• Avgreiðslu av posti og telefon
• Samskipan av samskifti við feløg og almennar myndugleikar
• Saman við stjóranum at leggja fundir til rættis
• Fyriskipan av journalisering og arkivering av tilfari felagsins
• Framleiðslu av ymiskum framløgutilfari og skrivligum tilfari

***Førleikakrøv***
Vit ímynda okkum, at skrivarin hevur hesar førleikar og eginleikar:
• Góðar samskiftisførleikar á føroyskum og enskum
• Vera vandur nýtari av KT herundir, Microsoft Office, Internet o.s.fr.
• Hevur evnir at samskipa og raðfesta arbeiði
• Hevur sjálvstøðugan arbeiðshátt, og megna at síggja hvat neyðugt er at gera
• Góð samstarvsevni

Vit kunnu bjóða eitt sera spennandi, mennandi og fjølbroytt arbeiði í einum ungum føroyskum felag, ið samstarvar við altjóða fyritøkur um oljuleiting við Føroyar. Skrivarin fær stóra ávirkan á menningina av arbeiðinum, og í hesum liggur stórur møguleiki fyri persónligari menning. Talan kann eisini verða um niðursetta arbeiðstíð. Løn eftir avtalu.

Starvið verður at seta skjótast gjørligt. Umsókn við prógvum, CV og hartilhoyrandi skjølum, skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 24. mai 2000. Nærri upplýsingar um starvið, fáast við at venda sær til Wilhelm Petersen á telefon 350100.

***Atlantic Petroleum***
Atlantic Petroleum/Atlants Kolvetni varð stovnað, við tí fyri eyga at luttaka í oljuleiting og framleiðslu við Føroyar, og í øðrum lagi uttan fyri Føroyar. Felagið hevur í dag, við meira enn 2000 partaeigarum, ein partapening uppá kr 46.250.000. Allur partapeningurin er á føroyskum hondum.

Atlantic Petroleum er partur av samtakinum The Faroes Partnership og tekur lut í fyrsta føroyska útbjóðingarumfarinum, saman við oljufeløgunum Amerada Hess, British Gas og DONG.

P/F Atlantic Petroleum
Bryggjubakki 4
Postrúm 1228
FO 110 Tórshavn
e-mail: wilhelmp@petroleum.fo
www.petroleum.fo

Atlantic Petroleum

stephanssons hús